**FYIGISKJAL 4**

## NOTAT

Rakstrar- og viðlíkahaldsætlan

Tá rakstrar- og viðlíkahaldsætlan verður gjørd, skulu niðanfyri nevndu viðurskifti takast við:

- Tann parturin av skúlanum, sum verður innrættaður til tekniska skúla, er ikki gjørdur sambært "tekniske forskrifter" (beredskabsstyrelse), tí er tað avmarkað, hvussu stór goymslan av eldfimum løgi og tilfari kann vera í hølunum.
- Innandura glasveggir mugu ikki verða lokaðir. Ynskir byggiharrin gardinur, skal tað avtalast við byggimyndugleikan.
- Svali í atrium kann innrættast við innbúgvi, har brandeffekt er max. 1,5 MW. Innbúgv má ikki setast nærri enn 1,3 m frá glasveggum til flokshølini. Hetta skal upplýsast á brunaplanunum, sum verða hongdir upp á skúlanum.
- Hurðar í rýmingarvegum, eisini har rýmingarvegir eru frá rúmi til rúm, skulu ikki vera læstar. Hesar eru gjørdar við ADK, sum verður deaktiverað, tá ABA fráboðar um eld.
- Kavarudding av rýmingarleið yvir tak og trappu, eisini rudding í trappurúmi frá takinum og inngongd á 4. hædd, har bilar koyra undir.
- Talið av fólki, sum kunnu verða í bygninginum, er ásett í brandstradigirapportini, síðu 33 og skal setast inn í rakstrar- og viðlíkahaldsætlanina.
- Skulu lyftir kunna brúkast av fólki, hóast ABA er frá, ella stillast á niðastu hædd.
- Omanfyri nevnda skal gerast, áðrenn bygningurin er sýnaður (um ikki annað er avtalað við kommununa. Byggiharrin skal í góðari tíð geva kommununi boð um nær bygningurin kann sýnast.